

www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 08 - 2013

# Shell risastórar íløgur í Norðsjónum

Eitt av heimsins størstu oljufeløgum, Shell, kunnger nú, at tað fer at gera íløgur fyri 17 mia. kr. hvør ár næstu 20 árini Ed Daniels, stjóri hjá Shell í Bretlandi sigur í samrøðu við The Daily Telegraph, at tað er ein misskiljing, tá sagt verður, at tey stóru oljufeløgini ikki longur hava áhuga fyri at gera íløgur í Norðsjónum. Hann sigur, at Shell fer at gera íløgur fyri 17 mia. kr. um árið næstu 10 til 20 árini í nýtt ella verandi virksemi. Eg rokni við, at Norðsjógvurin hevur fleiri ártíggjur eftir sum oljulandslutur, sigur Ed Daniels. Viðmerkingar hansara koma eftir, at ein kanning er gjørd, sum vísir, at 40% av feløgunum í Norðsjónum ikki framleiða ein dropa av olju. Kanningin frá Hannon Westwood vísir, at av 131 feløgum í økinum, hava 55 ongar olju- og gassgoymslur. Um somu tíð er framleiðslan munandi minkað. Framleiðslan væntast at røkka 1,5 mió. tunnur av olju um dagin, og tað er nýtt botnmet. Tá tað gekk best komu 4,5 mió. tunnur av olju upp úr undirgrundini í Norðsjónum um dagin.